# Semja millum Felagið Nótaskip og manningarfeløgini

Sáttmálarnir millum partarnar, sum fóru úr gildi ávikavist 1. desember 2010 og 31. desember 2010 halda fram við hesum broytingum.

1. Útreiðslur til landing til triðjapart verða drignar frá óbýttum. Sum higartil rindar reiðaríið landingarløn til manningina.

2. Útreiðslur til salt verða drignar frá óbýttum.

3. Eykapartar verða fastlæstir við 11 monnum, tá manningartalið er 11 og minni.

4. Partarnir eru samdir um, at trupulleikin við hækkandi brennioljukostnaði kann takast upp til viðgerðar, tá hesin sáttmáli skal endurnýggjast.

5. Grein 5 í felagsreglunum verður broytt, so manningin hevur rætt til fría heimferð í sambandi við skiftisskipanir, tá 1 mánaði er liðin, síðan skipið fór úr føroyskari havn.

6. Annars eru felagsreglurnar í sáttmálanum við manningarfeløgini frá 2009 galdandi.

7. Settur verður bólkur við 3 umboðum fyri manningafeløgini og 3 umboðum fyri Felagið Nótaskip at kanna og møguliga at gera tilmæli til partarnar út frá hesum arbeiðssetningi:

   *"Av tí, at kvoturnar hjá nótaskipunum eru so nógv skerdar, og helst verða skerdar enn meira, fara nótaskipini at verða til fiskiskap munandi færri dagar av árinum. Bólkurin skal fáa til vega taltilfar og kanna, um samlaða árliga úrtøkan hjá bæði reiðaríi og manning kann økjast, um partarnir gera eina avtalu um sigling til og frá marknaði. Endamálið er at kanna, um tað er lønandi fyri báðar partar at brúka liggidagar til økta siglingstíð til marknaðir, ið geva betri prís, og har partarnir eftir ávísum lutfalli býta øktu útreiðslurnar til sigling."*

   Felagið Nótaskip tekur stig til, at seta hetta arbeiði í gongd.

8. Sáttmálin er galdandi til 31. desember 2011

Tórshavn 02-02-11

Felagið Nótaskip
Jógvan Jespersen

Fiskimannafelagið
Jan Højgaard

Skipara- og Navigatørfelagið
Eyðstein Djurhuus

Maskinmeistarafelagið
Páll Hansen

# Rættingar í sáttmálanum millum P/F Hvalnes, Nótaskip og Føroya Fiskimannafelag 1 feb 2011.

Eftirløn: parturin hjá Reiðaranum er 40 kr pr dag og parturin hjá fiskimonnum er 4% av hýruni.

Trygdarskeið: Reiðarin rindar fyri nýtt trygdarskeið og læknaváttan, um maður hevur hoyrt til skipið í 6 mánaðir.

Trygdargrunnur Fiskivinnurnar: Føroya Fiskimannafelag rindar inn í grunnin av óbýttum.

Tórshavn
4 mai 2011.

| Vegna<br>P/F Hvalnes/Nótaskip | Vegna<br>Føroya Fiskimannafelag |
|---|---|
| ------------------------------ | ------------------------------ |
| Jógvan Jespersen | Jan Højgaard |